Dagf. 4. mai 2021
HMR J. nr. 21/06637-9

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-123/2020 eftir § 52a í tingskipanini um koronupass, frá Bjarna Kárason Petersen, løgtingsmanni

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu fer talgilda koppsetingarkvittanin / koronupassið at rigga?
2. Fer talgilda koppsetingarkvittanin / koronupassið at vera grundarlag fyri, hvat borgarar í landinum hava atgongd til í mun til almenn og privat frítíðar- og mentanartilboð, vørur og tænastur annars?
3. Kunnu fólk uttan koppsetingarkvittan / koronupass verða noktaði atgongd til ávís tilboð, vørur ella tænastur?

Til spurning 1:
Føroysku stjórnarráðini hava seinnu tíðina verið í samskifti við bæði danskar myndugleikar og fólk úr ES-kervinum um møguleikarnar fyri at fáa eitt altjóða góðkent koronupass til føroyingar. Eitt slíkt koronupass skal lúka nakrar treytir og standardir, sum ES-londini seta, og okkum kunnugt verður talan um eina skipan við nationalum loysnum við sínámillum góðkenning.

Sjúkrahúsverkið hevur í hesum sambandi víst á teir møguleikar, sum eru í bókingarskipanini, sum flutningsfyritøkan Smyril Line hevur ment saman við Sjúkrahúsverkinum, til at skipa koppsetingarnar í Føroyum. Bókingarskipanin hevur eina loysn innbygda, sum gevur møguleika at skriva út kvittan til fólk, tá tey eru liðugt koppsett.

Heilsumálaráðið hevur heitt á Sjúkrahúsverkið um at kanna, hvørji krøv verða sett í Danmark, fyri at ein kvittan, ið vísur, at ein er liðugt koppsettur fyri korona, passar inn í danska koronukoppsetingarpassið. Hetta arbeiðið er tikið upp við danska Digitaliseringsstyrelsen.

Til spurning 2 og 3:
Ongar ætlanir eru um, at ein talgild koppsetingarkvittan ella eitt korunupass skal vera grundarlag fyri, hvat borgarar í landinum hava atgongd til í mun til almenn og privat frítíðar- og mentanartilboð, vørur og tænastur annars, ella skulu verða noktaði atgongd til tilboð.

Heilsumálaráðið, 4. mai 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður